mars ´97 og upp í 27% í 2002. Men hann dettur niður aftur á 19% í seinastu kanningini. Tjóðveldisflokkurin liggur fremstur millum almennar løntakarar við 32% í seinastu kanning; Sambandsflokkurin honum á baki við 24%.

## Sambandsflokkurin arbeiðaraflokkur?

Tá ið Observa gjørdi fyrstu veruligu veljarakanning fyri Dimmalætting í 1978, var tað ikki sørt, at Sambandsflokkurin hevði hug at breggja sær av at vera størsti arbeiðaraflokkur. Tað bygdi hann á, at hann var tann flokkurin, sum stóð sterkastur millum løntakarar í privatari vinnu. Men síðani misti hann – fyri eina tíð – takið á hesum bólkinum. Tølini fóru úr 29% niður í 13 í 1990, men hava tó síðani havt hug at lagt seg á eitt støði um 26-27%. Samstundis sum Sambandsflokkurin fullkomiliga misti tamarhaldið á løntakarunum í privatu vinnuni, so tók hann seg væl fram ímillum tey alment løntu, so hann leyp fram frá 12 prosentum í 1984 upp í 23 í 1990. Í seinastu kanningunum frá 2002 og 2006 vóru vóru tað 24-25% av av hesum slagnum av veljarunum, sum atkvøddu fyri Sambandsflokkinum.

## Hvørjir eru so arbeiðaraflokkarnir?

Í seinastu kanningini frá 2006 standa Tjóðveldisflokkurin og Sambandsflokkurin sterkastir millum løntakarar innan tað privata. Tølini hjá hesum báðum flokkum liggja um 27-30%, meðan hinir báðir av teimum fýra stóru, Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin liggja um tey tjúgu. Men so skal havast í huga, at tú skalt ikki meira enn 12 ár aftur í tíð, tá ið Javnaðarflokkurin lá væl hægri enn hinir og hevði umleið triðingin av privatu løntakarunum við sær. Fólkaflokkurin hevur í meira enn eitt tíggjuáraskeið havt góðan fjórðing av løntakarunum innan tað privata aftan fyri seg, men her er parturin so minkaður niður í 18% í seinastu kanningini.

Millum alment lønt stendur serliga Tjóðveldisflokkurin seg væl við 32%; honum næstur Sambandsflokkurin við 24, meðan Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin eru darlaðir afturúr og eru endaðir niðuri á 18-19 prosentum. Men eisini í hesum førinum skalt tú ikki so langt aftur í tíð fyri at finna eina glæsiligari fortíð. Í 1984 lá t. d. Fólkaflokkurin langt oman fyri hinar, tá ið tað ráddi um at eiga stuðul mill-um alment lønt: 34% hevði hann, meðan hinir tríggir stóru spentu úr 12 upp í 24%.

Tað ber sjálvandi til at siga, at Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin ganga aftur við dyggum stuðli hjá løntakarum bæði innan tað privata og tað almenna, og tí eru teir báðir frægastu boðini upp á at kunna nevna seg arbeiðaraflokkar. Rættari er tó at taka tey øðiligu sveiggini upp og niður við í metingina, tí tað vísir at vera skjótt hvønn vegin – fyri allar flokkar. Tað, sum kann leggjast afturat, er, at tað tykist sum um, at Sambandsflokkurin hevur staðið stinnastur millum tímalønta arbeiðsfólkið og fiskimenn seinastu tíggju árini við rættuliga støðugt at hava umleið ein fjórðing. Tjóðveldisflokkurin tykist hinvegin at hava verið í eini serstøðu millum alment lønt seinastu tíggju árini við tølum úr 28 prosentum og upp í 37, meðan Fólkaflokkurin hevur lagt seg á eitt støði umleið tey 16 prosentini.

## Borgarligu flokkarnir frægari fyri millum sjálvstøðug vinnurekandi

Frægari gongst Fólkaflokkinum, tá ið tað kemur til tey sjálvstøðug vinnurekandi sum handilsmenn, handverksmeistarar, bøndur og útróðrarmenn. Her fær hann stuðul frá 30%´um, meðan Sambandsflokkurin liggur eitt sindur niðanfyri við 24%´um í seinastu kanningini frá 2006. Hinir báðir stóru flokkarnir hava vanliga ligið nakað niðanfyri, men í hesari kanningini hevur Tjóðveldisflokkurin tikið seg fram úr 19 og upp í 30% undir liðina á Fólkaflokkinum. Javnaðarflokkurin fær hinvegin bert 14% av stuðlinum frá hesum bólkinum av veljarununum. Fólkaflokkurin hevur mist sína einaráðandi støðu í hesum bólkinum, samanbera vit við tøl frá 90-árunum, tá ið hann lá millum 35 og 41%, og eingin stóð honum kurl. Í dag fær hann kapping frá Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkinum.

Men eisini í hesum bólkinum er tað tey ógvusligu sveiggini upp og niður – og so aftur upp – ið eyðkenna myndina meira enn nakað annað. Í 1984, tá ið studningspolitikkurin var í hásæti millum allar flokkar, var styttri millum flokkarnir – úr 20 upp í 28% - og Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin høvdu munin, tá ið tað ráddi um at eiga stuðul í hesum samfelagsbólkinum. 10 ár seinni - í ringastu krepputíð – var fullkomiliga vent í holuni: Nú høvdu hesir báðir ikki meira enn góð 10% aftanfyri seg, Sambandsflokkurin góð 20, meðan Fólkaflokkurin hevði góð 40% av teimum sjálvstøðug vinnurekandi í sínum parti. Munirnir eru síðani aftur tódnaðir nakað.

Pensiónistarnir býta seg javnt millum 4 teir stóru.

Sambandsflokkurin er tann flokkurin, ið plagdi at standa seg best, tá tað ræður um at vinna stuðul millum teirra, ið ikki longur eru í aktivari vinnu. 40% av pensiónistunum høvdu í 2002 Sambandsflokkin sum frægasta flokkin. Sambandsflokkurin hevur altíð ligið væl fyri í hesum samfelagsbólkinum – millum 34 og 29% síðani 1990 – men nú tykist hann at missa takið. Frá at hava eina einaráðandi støðu í 2002 við stuðli frá 40% av pensiónistunum, er hann farin 15% aftur niður í 25. Men munurin er lítil og eingin millum hann og hinar tríggjar teir stóru flokkarnar, sum hava úr 22 upp í 24% í part. Ein annar flokkur, ið hevur mist munandi seinastu 11-12 árini, er Sjálvstýrisflokkurin, sum er farin úr 13%´um og niður í 5. Taka vit alt skeiðið síðani 1990 undir einum, so er tað sermerkta, at tann borgarligi parturin av spektrinum, ið stóð so nógv sterkari millum pensiónistar í 1990, hevur mist, meðan teir báðir, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, ið mynda vinstrusíðu í føroyskum politikki, eru gingnir fram undir einum.

# Lokala umboðanin stóran týdning

**Lokala umboðanin er altgerandi hjá Sjálvstýrisflokkinum, heldur Kári P. Højgaard, sum fegnast um, at Sjálvstýrisflokkurin er at finna omanfyri sperrumarkið í veljarakanningini**

VELJARAKANNING

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Sjálvstýrisflokkurin hevur sambært veljarakanningini eina lítla afturgongd á 0,2%. Seinasta løgtingsval var undirtøkan 4,6%, meðan veljarakanningin vísir, at undirtøkan fyri flokkinum í dag, er 4,4%. Kortini heldur Kári P. Højgaard, formaður Sjálvstýrisfloksins, at talan var um eitt positivt úrslit fyri flokkin:

- Eg haldi at hatta var eitt fint úrslit. Serliga tí, at vit liggja omanfyri sperrumarkið. Tað hevur sera stóran týdning, sigur Kári P. Højgaard.

Sum kanningin vísti, so vil meiri enn helmingurin av veljarunum vera við, at teir liggja mitt á vinstra/høgra-ásanum. Eitt vørumerkið hjá Sjálvstýrisflokkinum hevur longi verið, at hann er einasti flokkurin, sum liggur mitt á miðjuni. Átti hetta ikki at givið flokkinum ein risa fyrimun ímun til aðrar flokkar, sum onkursvegna hella eitt sindur til vinstru ella høgru?

- Eg leggi framvegis dentá, at Sjálvstýrisflokkurin er einasti flokkurin, sum liggur mitt á miðjuni. Men flokkurin hevur tann trupulleikan at dragast við, at hann bara hevur ein tingmann. Tað vil siga, at í eini kanning sum hesari, hevur veljarin í teimum ymisku valdømunum, bara hevur ein eysturoying at identificera seg við, meðan hinir flokkarnir hava tinglimir kring landið. Eg trúgvi, at um vit høvdu ein lista við valevnum, hevði úrslitið verið munandi øðrvísi, sigur Kári P. Højgaard, sum harvið staðfestir, at lokala umboðanin er altavgerandi hjá einum flokki sum Sjálvstýrisflokkinum.

**Úr veljarakanning mai 2006.**

| % | | Fólkafl. | Sam-bandsfl. | Javn-aðarfl. | Sjálv-stýrisfl. | Tjóð-veldisfl. | Miðfl. | Blankt /ikki á val /veit ikki | Tils. | N= |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Slag av lønarbeiði | fastlønt | 17 | 21 | 17 | 2 | 27 | 4 | 14 | 100 | 346 |
| | timalønt | 14 | 22 | 17 | 1 | 25 | 3 | 20 | 100 | 162 |
| Sjálvstøðug vinnurekandi | | 25 | 20 | 12 | 1 | 25 | 1 | 18 | 100 | 102 |
| Pensiónistar | | 21 | 22 | 20 | 5 | 21 | 1 | 10 | 100 | 179 |
| Kyn | Kvenn | 17 | 20 | 17 | 2 | 24 | 3 | 17 | 100 | 550 |
| | Kall | 19 | 23 | 14 | 3 | 26 | 3 | 13 | 100 | 442 |
| Aldursbólkar | 18-24 | 18 | 18 | 18 | 0 | 24 | 5 | 18 | 100 | 62 |
| | 25-34 | 13 | 22 | 13 | 1 | 27 | 7 | 17 | 100 | 143 |
| | 35-44 | 18 | 24 | 13 | 1 | 22 | 4 | 18 | 100 | 238 |
| | 45-54 | 14 | 15 | 19 | 2 | 32 | 2 | 16 | 100 | 201 |
| | 55-64 | 22 | 23 | 16 | 2 | 25 | 1 | 12 | 100 | 153 |
| | 65+ | 22 | 23 | 19 | 5 | 20 | 2 | 10 | 100 | 189 |




